# Matrikulstovan

Jónas Broncks gøta 25
Postboks 327
FO-110 Tórshavn

Tlf.: 357900
Fax: 357901
E-mail: post@matrikul.fo
Heimasíða: www.matrikul.fo

## Landinspektørur ella útskiftingarkandidatur

Søkt verður eftir landinspektøri ella útskiftingarkandidati at arbeiða í matrikulsins umsiting og útskiftingini frá 1. mars 2006.

**Førleiki**
Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur:

- Prógv sum landinspektørur, útskiftingarkandidatur ella líknandi.
- Góðan teldukunnleika
- Góð samstarvsevni
- Kunnleika til føroysk jarðarviðurskifti.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

**Upplýsingar**
Fyrispurningar um starvið kunnu setast Øssuri Midjord, stjóra ella Bjarna Hansen, leiðara av matrikulsins umsiting.

**Umsókn**
Umsókn, saman við prógvum og møguligum viðmælum, skal sendast til:

**Matrikulstovan**
**Postboks 327**
**110 Tórshavn**

Umsóknir skulu vera Matrikulstovuni í hendi í seinasta lagi 15. februar 2005.

*Matrikulstovan er stovnur undir Innlendismálaráðnum. Arbeiðsøkini á stovninum eru viðlíkahald av matriklinum, marknasetingar, útskiftingar, uppmálingar, kortlegging og adressuskráir. Á stovninum starvast 15 fólk.*

## Tvingsilssøla av skipi

**Fríggjadagin tann 24. mars 2006, kl. 13.30** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir rækjutrolaran **m/s »Napoleon« OW 2424, BRT 1.833, NRT 550.**

Skipið er bygt í 1987 á P/f Skála Skipasmiðju, Skála. Skipið er skrásett á Glyvrum í 2002.

Sambært skipaskrásetingini egur P/f Kongshavnar Útgerðarfelag, 625 Glyvrar, skipið.

Fyrireikandi tvingsilssølufundur er ásettur at fara fram á Dómaraskrivstovuni **fríggjadagin tann 10. mars 2006, kl. 13.30**, og verður tann, ið metir seg at hava veð í skipinum, innkallaður til fyrireikandi tvingsilssølufundin.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Óla Jákup Kristoffersen, avdokati, Fr. Petersensgøta 9, Tórshavn, tlf. 311145 (j. nr. 20051043), AS 4-2006**, sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja skipið.

Áhugað kunnu eisini síggja søluuppstilling og onnur skjøl í samband við tvingsilssøluna við at venda sær til Føroya fútarætt

**Føroya Fútarættur**

31. januar 2006

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 4145**
**Navn:** Sp/f Ráðin
**Adressa:** Stangavegur 3 700 Klaksvík
**Kommuna:** Klaksvíkar
**Stovningardato:** 17-01-2006
**Viðtøkudato:** 17-01-2006
**Stovnarar:**
Jákup Andrias Mikkelsen, Undir Brúnni 39, 700 Klaksvík
Niclas Heri Jákupsson, Kósarskákið 4, 700 Klaksvík
**Stjórn:**
Jákup Andrias Mikkelsen, Undir Brúnni 39, 700 Klaksvík, (stjóri)
Niclas Heri Jákupsson, Kósarskákið 4, 700 Klaksvík, (stjóri)
**Grannskoðari:**
Sp/f Agnar á Dul, Gerðagøta 31, Boks 15, 700 Klaksvík
**Partapeningur:** kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av báðum stjórum.
**Endamál:** Endamál felagsins er at eiga og umsita partabrøv, keyp og søla í hesum sambandi, íløguvirksemi og annars at reka handil og ídnað og aðra vinnu.
**Roknskaparár:** 01.01 - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 17.01.2006 - 31.12.2006

*Skráseting Føroya*
*tann 30. januar 2006*
*Kristin Balle*

*Glarsmiðjan letur upp*
*í Dr. Jacobsensgøtu 7*

*Fríggjadagin 3 februrar lata vit upp í nýggjum hølum í Dr. Jacobsensgøtu 7.*
*Vit bjóða okkurt leskiligt frá kl. 14 til 17.*
*Listafólk, viðskiftafólk og vinfólk eru hjartaliga vælkomin.*
*Eisini hava vit nógvar nýggjar málningar til sølu.*

*Glarsmiðjan*
*Innramming og Gallarí*

## Frá Leirvíkar Arbeiðsmannafelag

Ársaðalfundur Leirvíkar Arbeiðsmannafelag verður 28. februar 2006. Tíð og stað verður kunngjørt seinni.

Dagsskrá sambært lógum felagsins.

Uppskot til ársaðalfundin skal vera nevndarformanninum í hendi í seinasta lagi 21. februar 2006.

**Nevndin**

Lesið internet Sosialin !




W W W . S O S I A L U R I N . F O